gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# Føroyskur partabræva-marknaður?

Hóast tankin um føroyskan partabrævamarknað er áhugaverdur, so eiga menn at umhugsa hettar mál sera gjølla. Hví vilja menn hava ein slíkan? Eru tað nationalistisk motiv, har marknaðurin skal verða tekin um sjálvbjargni? Ynskja menn eitt samfelag, har tær fríu marknaðarkreftirnar skulu hava so víðar ræsir sum møguligt? Gongur Fólkaflokkurin ørindi fyri teir, ið vilja sleppa framat aftur fyrrverandi Sjóvinnubankanum, Fiskavirking, Fiskasøluni o.s.fr?

Tørvar vinnuni veruliga ein føroyskan partabrævamarknað? Sagt er, at ein fortreyt fyri ein partabrævamarknað er, at almennu partafeløgini verða listaði á partabrævamarknaðinum. Valla nakað herðaklapp til føroyskt vinnulív – er veruliga einki, ið er áhugavert at gera íløgur í innan føroyskt vinnulív? Um vinnuni veruliga tørvar ein partabrævamarknað, hví eru so ongar privatar fyritøkur, ið kunnu brúkast sum "prøvikaninir" fyri at vita, um príslegan veruliga endurspeglar virðið á feløgunum. Skattgjaldarin kann neyvan vera tryggur við at hansara ogn skal brúkast til eitt eksperiment sum væl kann miseydnast, tí talið av partabrævahandlum verður ov lítið.

Tað er einki minni enn ein vanlukka, um almennu partafeløgini verða seld í stórum, og privatar kreftir keypa tey fyri ein undirprís fyri síðani bert at sita á partabrøvunum, sum vit føroyngar hava til siðvenju. Hvat er nyttan av einum partabrævamarknaði tá?

Um føroyskar fyritøkur hava tørv á at kunna skráseta seg á einum partabrævamarknaði og handla partabrøv, so liggur heimurin opin. Í hesum globaliseringstíðum gerast partabrævamarknaðir alsamt størri. Hví ikki arbeiða fyri skráseting í Keypmannahavn, London, Frankfurt, New York o.s.fr.

Nú vil kanska onkur føra fram, at krøvini á hesum marknaðum eru alt ov høg. Er tað ikki júst soleiðis fríu marknaðarkreftirnar fungera? Tað er einki galið við at vera protektionistiskur og ganga inn fyri eitt vart vinnulív, ið sleppur léttari á ymsan hátt, tí tað ikki klárar seg móti tí stóru verð, men so er at siga og viðganga tað! Tað ger høgrivongurin í Løgtinginum ikki, og Vinnuhúsið kundi havt gott av, at gjørt sína støðu eitt sindur klárari hesum viðvíkjandi.

Tað er einki meira ódámligt enn liberalistar, ið latast ganga inn fyri fría kapping, men í veruleikanum eru teir ringastu at uppfinna serføroyskar dunnuhyljaskipanir.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Jan Müller 50



Mánadagin fyllir ábyrgdarblaðstjórin á Sosialinum, Jan Müller 50 ár. Ein hálv øld er farin síðan hesin stríðsmaður, brynjaður við penni, varð borin í heim og nógvir stavir eru feldir á blað, síðan hann kom í tað liðið, ið hevur átikið sær at bera tíðindi úr samfelagnum til borgaran, frá borgaranum til samfelagið.

Journalistikkin fekk hann við sær næstan við móðurmjólkini. Pápi Jan, Eiden Müller, sáli, var ein av okkara fyrstu journalistum, sum burturav fór at skriva og liva av tí pennurin gevur. Teir skrivandi menninir, í hvussu er í fyrra parti av seinastu øld, vóru ofta menn, sum høvdu onnur størv. Antin sum prentarar, ella menn, sum vóru frammi í tíðini og hjarta brendi fyri skrivaða orðinum, men sum høvdu onnur størv, ið góvu dagliga breyðið. Eiden kom at starvast á Dimmalætting, og samam við G.L. Samuelsen, sála, telist hann millum fyrstu limir blaðmannafelagsins og millum teir fyrstu, sum tók journalistayrkið burturav sum livibreyð.

Reint genetiskt, so var longu avgjørt í tíðarinnar morgni, at Jan skuldi vera journalistur, og tað hevur hann verið, síðan hann gjørdist vaksin.

Eyðkennið fyri Jan er, at hann er heilur, har hann er. Fellir hann fyri einum evni, so helmar hann ikki í, fyrr enn málið er lýst út í æsir. Ja, hann næstan jakstrar evnið til tað óendaliga, og slíkt treiskni er gott hjá einum tíðindamanni.

Hann er komin niður á botn í fleiri málum, og seinastu árini er ikki tað ting hent innan oljuvinnuna, uttan at tað eisini er farið gjøgnum hansara hendur. Hann er tann føroyski journalisturin, sum er best inni í oljuvinnuni. Hann hevur altíð havt áhuga fyri komandi vinnum, og hann trýr upp á tær, til tað mótsætta er prógvað.

Sum debattørur er hann kanska bliknaður nakað seinastu árini. Men tíðin er eisini broytt, og alt er ikki so svart og hvítt, sum tað var í sjeyti- og áttatiárunum, har tú antin var til høgru ella til vinstru og var púra einki, skuldi tú verið at finna á miðjuni. Blaðkjakið er sum heild vorðið linari síðan Gorbatjov feldi múrin, apartheid varð hildið at vera ótíðarhóskandi, og tann versti hvørki var at finna eystafyri ella vestanfyri, men mest inni í okkum sjálvum.

Jan gongur upp í sítt arbeiði sum journalistur við lív og sál, og hann er ein livandi tipsbanki hjá sínum blaðfólkum. Eina ótrúliga kontaktflatu og eina ósvikaliga nøs fyri søgum.

Uttan fyri arbeiði hevur hann eisini áhugamál, sum hann gongur upp í við lív og sál. Hann er góður billiardspælari, er á triðja plássinum í ár, men hevur eisini verið ovast onkuntíð. Hann er at síggja í svimjihøllini javnan, og starvsfólk skuldseta hann fyri at vera meira til arbeiðis har enn at njóta klordampin og hitan úr hitarúminum.

Privat giftist hann Tove á ólavsøku í fjør. Tey hava livað saman í eitt mannaminni saman við børnunum.

### Minningarorð um Johan Johansen 1914 - 2001

Ikki sigst annað, enn at norðoyingar hava sett sín týðiliga dám á guðstænasturnar í teimum báðum kirkjunum í Havnini í farnu øld. Í Havnar kirkju røktu tveir klaksvíkingar organistembætið meginpartin av øldini. Jógvan Waagstein varð settur sum organistur við kirkjuna longu í 1902, og seinni røkti versonurin Johan Johansen starvið í mong ár.

Mánadagin 19. Mars andaðist Johan Johansen. Johan hjá Miu, sum hann vanliga varð nevndur, var 86 ár nú hann doyði.

Undirritaði er ikki førur fyri at geva eina fullfíggjaða mynd av Johan hjá Miu. Tað mugu tey gera, ið kendu hann betur. Men Johan var ein teirra, ið vakti mín áhuga fyri orglinum og orgulspæli miðskeiðis í sjeytiárunum. Hóast høgan aldur gavst hann ikki so við spælinum, men hjálpti trúliga til tá ið tørvur var á organistum. Og tørvurin vaks, so hvørt sum Havnin vaks. Heilt fram til miðskeiðis í áttatiárunum spældi Johan Johansen javnan til guðstænastur í Havnar kirkju, og í mong ár var hann álitið í kapellinum á Landssjúkrahúsinum.

Upp á ein máta er orgul eitt rættiliga torført instrument, serliga um tú skalt fáa "lív" í tað. Lætt er, at tað kann ljóða steindeytt. Eg náddi ongantíð at spyrja Johan, hvør hevði lært hann at spæla, men hann fekk lív í orglið sum fáur. Tað var "pondus" í spælinum, og ongantíð var keðiligt at vera í kirkju, tá ið Johan sat við orglið. Hann megnaði at lyfta tungar og keðiligar sálmar, so at teir gjørdust syngjandi, og hvør pípa í orglinum sang.

Tað var okkum øðrum organistum ein gáta, hvussu Johan bar seg at við at fáa so góðan sálmasang í kirkjuni, og mangur man hava roynt at lúra honum kynstrið av. Tá ið Johan spældi, sang kirkjufólkið, so tað rungaði. Sjálvt í tí turra akustikkinum, sum tá var í Vesturkirkjuni. Kanska hevði Johan hetta í blóðinum – sálmasangurin í Klaksvík hevur jú altíð verið tiltikin góður – men tað gjørdist helst ikki verri av, at hann sang afturvið orglinum, nakað sum organistar gera í mongum øðrum londum.

Og Johan sang ikki bara – hann sang fyri. Hesin stillføri maður hevði eina sera kraftmikla sangrødd, ið sum einki fylti tað stóra rúmið í Vesturkirkjuni. Var eingin annar sum sang í kapellinum, so tryggjaði Johan at sangurin gjørdist góður kortini. Tað sigst, at hann dugdi gomlu sálmabókina uttanat.

Hóast høgan aldur var Johan góður at heita á, tá ið brúk var fyri organistum, og hann spældi líka til tann dag ið hann ikki longur sá at lesa nótarnar. Eisini var Johan sera góður í ráðum, tá ið tú vildi hava okkurt at vita um sálmasang, koralsang og guðstænastuspæl í Havnini og Klaksvík í gomlum døgum. Hann gav sær altíð stundir at svara spurningum og var ein góð kelda, tá ið greinar skuldu skrivast ella útvarpssendingar gerast um hetta evni. Minnið var gott, áðrenn tað sveik hann heilt, og Johan visti eisini nógv at siga frá um sálmatraditiónina í Norðurlondum. Honum dámdi sera væl tann lætta og ljósa sálmasangin í Danmark og Íslandi, ið var ein avleiðing av tí slóðbrótandi arbeiðinum hjá Thomas Laub. Minni tokka hevði hann til – sum hann sjálvur orðaði tað – tey "vemodigu" løg, ið norðmenn og svenskarar brúktu.

Harrin styrki tykkum ið eftir sita, og friður veri við minninum um heiðursmannin Johan Johansen.

**Heri Eysturlíð**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.








# Vilt tú verða ein av okkum

**So átti tú at gjørt sum vit. Vit eru í holt við eina spennandi og fjølbroytta útbúgving á Tryggingarfelagnum Føroyum.**

Útbúgvingin er ein tvey ára fíggjarútbúgving við sergrein innan trygging. Tú fært hollan kunnleika um tryggingar og lærir m.a. um løgfrøðina aftanfyri tær. Tú arbeiðir eitt skifti í senn á ymiskum deildum. Á henda hátt fært tú innlit í bygnaðin á eini stórari fyritøku við yvir 100 starvsfólkum.

Tann teoretiska førleikan fært tú við at fylgja undirvísing og skriva uppgávur við jøvnum millumbilum. Útbúgvingin gevur tær góðar møguleikar fyri framhaldandi tryggingarútbúgving til eitt nú tryggingarráðgeva ella skaðaviðgera.

Tað er ein treyt, at tú ert studentur, HF'ari, HH'ari ella samsvarandi. Um tú tekur prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

Vilt tú vita meira, kanst tú tosa við Henry Olsen, deildarstjóra, á tel 345509 ella fartel 211715. Ella tú ringir til ein av næmingunum fyri at hoyra, hvat teir halda um útbúgvingina og um Tryggingarfelagið Føroyar sum læruplláss.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 23. apríl. Avrit av prógvum og møguligum viðmælum skulu fylgja við umsóknini, sum skal sendast til:

Tryggingarfelagið Føroyar
starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

**Helgi Lamhauge Petersen, 22 ár, úr Rituvík:**

"Útbúgvingin er avbjóðandi og spennandi. Eg havi verið á fleiri deildum í felagnum, eitt nú skaðadeildini, privatdeildini og vinnulívsdeildini. Eg havi eisini gingið til undirvísing, skrivað uppgávur og verið til próvtøkur. Eg kundi steðgað eftir tveimum árum, men ætli mær eina hægri útbúgving innan trygging."

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin · Postsmoga 329 · 110 Tórshavn
Tel 345600 · Fax 345601
tf@trygging.fo · www.trygging.fo

Tryggingarfelagið Føroyar er eitt sínámillum tryggingarfelag, sum hevur høvuðsdeild í Havn og hevur 5 deildir kring landið. 111 fólk starvast í felagnum. Fyri starvsfólkini ynskja vit at skapa fastar karmar um ymsu arbeiðsøkini, soleiðis at starvsfólkini vita, hvørjar uppgávur tey skulu loysa, og hvat felagið væntar av teimum.

SANSIR TEL 355 355